# Poul Jákup hevur ikki



*– Her í Skarvanesi havi eg funnið tað, sum eg ikki havi sæð so nógva aðrastaðni – friðin, sum ein má tvinga seg sjálvan inn í, sigur nýggi íbúgvin á Skarvanesi, Poul Jákup Thomsen*

**Havnarmaðurin Poul Jákup Thomsen hevur brotið upp úr nýggjum og hevur sett seg niður í lítlu bygdini Skarvanesi. – Hetta er eitt ótrúligt stað. Her kann eg merkja friðin og her kann eg merkja meg sjálvan, sigur Poul Jákup, sum nú ber tilnavnið "Poul í Geil"**

BYGDARLÍV
*Orð/myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skarvanes:** Sigur ein Poul Jákup Thomsen, sigur ein samstundis "ein rættur havnarmaður". Hann er vaksin upp í høvuðsstaðnum, og tí hevur Havnin sjálvandi nógv at siga í lívi hansara.

Men sum Poul Jákup tekur til: – Soleiðis sum lívið fer fram, fær ein eisini onnur virðir, sum gerast týdningarmikil.

– Eg byrjaði at arbeiða og undirvísa hjá Heilbrigdið her á Skarvanesi. Og tá so eini hús vórðu til sølu, avgjørdi eg at flyta suður. Tað havi eg ikki angrað, sigur hann.

Hann kann eisini fegnast um, at restin av familjuni somuleiðis er fegin um hetta stigið, sum hevur givið honum nøkur nýggj virðir í lívinum.

– Hvørji hesi virðini eru? Jú, friðurin – henda róin, at kunna vera púra einsamallur í bygdini, tí eingin annar býr her.

– Sært tú, tað er henda róin at vera tvingaður at vera saman við sær sjálvum og venja seg til tað, – tað ber illa til at greiða frá tí. Tað má bara upplivast, sigur Poul Jákup.

## At merkja seg sjálvan

Fyri nýggja íbúgvan í Skarvanesi er eingin ivi um teir fyrimunir og tær serstøku upplivingar, sum bygdarlívið her geva honum.

Honum nýtist bara at fara út um eina løtu ella gloppa stovuvindeygað, so er náttúran honum so nær, so nær. Í fjøruni bróta aldurnar og fram við húsunum tutlar áin.

– Ja, hugsa tær hetta – at kunna hoyra og eygleiða fuglin í haganum. Síggja kópin og fuglin á sjónum, hoyra seyðin, gæsnar, dunnurnar og hønurnar í túnum.

– Tá eg síggi ein skarv fara flúgvandi í fjøruni, so er tað ein sera vøkur sjón, her hann fer framvið við sínum langa hálsi. Hann er ein sera vakur fuglur – tja, eg veit ikki, hann fær meg altíð at hugsa um eitt Concorde-flogfar!

Eitt tað besta Poul Jákup veit er at ganga langar túrar, niðan í hagan ella inn eftir vegnum.

– Her fært tú veruliga tíð at hugsa um teg sjálvan, merkja teg sjálvan og kenna henda vælsignaða friðin rundan um teg.

– Soleiðis er Skarvanes bara, sigur Poul Jákup, sum býr í teimum fyrstu húsunum í bygdini.

## Tilvitaður um lívið

Ein skuldi trúð, at tað tók drúgva tíð hjá einum innføddum havnarmanni at umhugsa avgerðina at flyta til eitt so fjarlagið stað sum Skarvanes.

At hetta yvirhøvur gjørdist veruleiki hevur sjálvandi sína orsøk og sína søgu. Sigast kann, at hetta hevur ikki skarvað eitt einasta petti av lívsvirðum hansara:

Alt byrjaði við at Poul Jákup fór at undirvísa í hølunum, sum Heilbrigdið hevur her í bygdini. Eitt var at undirvísa øðrum í sálarfrøði og samskifti og øðrum viðurskiftum, sum snúgva seg um avvarðandi hjá rúsmisnýtarum.

Men hjá Poul Jákupi sjálvum byrjaði sálarfrøðin eisini at gera sína ávirkan. Hann gjørdist rætt og slætt bitin av bygdarlívinum.

Sum hann sjálvur tekur til: – Eg byrjaði snøgt sagt at merkja sálarfriðin sum er á einum slíkum lítlum plássi sum hesum – henda serstaka friðin, í mun til alt stressið í Havn.

– Annaðhvørt fær ein eyguni upp fyri honum – ella fær ein tað ikki! Eg eri annars kendur fyri at renna runt og ikki hava so nógv samband við meg sjálvan og kenslur mínar.

– Men her suðuri varð eg tvingaður til at gerast meiri tilvitaður um tað at liva, – tað at kunna merkja seg sjálvan og vera í samband við seg sjálvan. Skal eg siga sum er, so hevur tað faktiskt verið ein gleðilig uppliving, sigur Poul Jákup.

## Felagsskapur í einseminum

At búgva í Havn og á Skarvanesi er sum tveir heilt ymiskir heimar. Men kortini hava hesir heimarnir eitt til felags:

– Hygg bara sum í dag. Í gjár var eg einsamallur her, og í dag er húsið fult av fólki sum koma á skeið. Soleiðis fært tú eisini nøktað tín sosiala tørv her á staðnum.